# – Eg hati leysar endar

**– Eg hati leysar endar, sum listarfólk kanska hava lættari at liva við, sigur Annlis Bjarkhamar, sum næstu mánaðirnar fer at brúka frítíð sína til at samskipa stóra tónleikafestivalin í Gøtu**

TÓNLEIKUR
*Eyðun Klakstein*

Fyrrverandi landsstýrismaðurin við mentamálum, Annlis Bjarkhamar, hevur tikið eina øðrvísi og stóra uppgávu á seg í hesum árinum.

Hon skal samskipa stóra tónleikatiltakið G! festivalinum, sum verður hildin í Gøtu á triðja sinni í juli mánaði.

– Eg eri komin at kenna tónleikaumhvørvi í Gøtu gjøgnum Free Føroyar tiltøkini, sum eg var við til at skipa fyri, og gjøgnum G! festivalin í fjør, tá ið eg hjálpti til, sigur Annlis Bjarkhamar.

Í fjør kom hon upp í leikin stutt áðrenn festivalin at hjálpa til við vaktarhaldinum, men hesaferð er tað hon, sum skal seta fólk hava ábyrgdina av teimum ymsu økjunum.

– Eg veit, at hetta er ein sera stór uppgáva, men eg eri spent upp á hana, og fyri meg er endaliga úrslitið fyrst og fremst lønin fyri stríðið, sigur Annlis Bjarkhamar.



*– Eg veit, at hetta er ein sera stór uppgáva, men eg eri spent upp á hana, og fyri meg er endaliga úrslitið fyrst og fremst lønin fyri stríðið, sigur Annlis Bjarkhamar*

### Betri fyrisiting

Starvið sum samskipari á G! festivalinum er ikki fulltíðarstarv. Tað eru fíggjarligu umstøðurnar ikki til.

– Tí fari eg at brúka meginpartin av frítíðini hjá mær næstu mánaðirnar til at skipa fyri, sigur Annlis Bjarkhamar.

Hon skal millum annað finna fólk at standa fyri øllum teimum ymsu uppgávunum, sum eru á einum slíkum festivali. Uppgávurnar eru nógvar, og eingin kann røkja allar.

– Tað er umráðandi at fáa góð fólk at taka sær av teimum ymsu uppgávunum. Tað ræður um at fáa nógv fólk við, so tað verður lættari at skipa fyri.

– Hetta verður strævið, men eisini sera spennandi, og tað er meira av idealistiskum orsøkum enn peningaligum, at eg geri hetta, sigur Annlis Bjarkhamar.

### Eingir leysar endar

Hon ætlar sær at gera eina meira skipaða fyrisiting av festivalinum, og einki verður latið tilvildini at ráða yvir.

– Eg hati leysar endar, sum listarfólk kanska hava lættari at liva við, sigur hon avgjørd.

G! festivalurin verður hildin í døgunum frá 16. til 18. juli, og arbeitt verður støðugt við at finna tónleikanøvn, sum skulu verða við. Enn er einki navn almannakunngjørt, men formaðurin í Grót segði við blaðið í gjár, at arbeitt verður við bæði útlendskum og føroyskum nøvnum.


Vaskifólk
Til Havnar Timburhandil

Vit sóknast eftir einum fólki at vaska avgreiðsluøkir okkara í Byggimarknaðinum og Timburavgreiðsluni í Tórshavn. Starvið ynskist sett áðrenn 1. februar 2004.

Starvið fevnir um vanliga reingerð og skal fara fram eftir at handilin er stongdur.

**Vit vænta at tú:**

- ert nærløgd/nærlagdur og røkin
- vísir vilja at samstarva við onnur

Løn sambært avtalu.

**Umsóknin skal sendast til:**
Timburhandilin
Heykavegur 4, Box 3038
FO-110 Tórshavn

Att: Jógvan Jørgensen

*Hevur tú spurningar kanst tú venda tær til okkum á tlf. 31 12 50*

TIMBUR HT TILFAR HANDILIN

**Tórshavn:** Tel 31 12 50 • Fax 31 54 60 • ht@ht-tilfar.fo
**Sandur:** Tel 36 12 50 • Fax 36 11 50 • ht@ht-tilfar.fo • **Kambsdalur:** Tel 44 44 41 • Fax 44 48 41 • ht@ht-tilfar.fo
**www.timburhandilin.fo**

petur & petur • 320870



Til sølu



Ogn bankans, matr. 218, við Stóra í Sandavági, fyrrverandi deild bankans, er til sølu um hóskandi boð fæst.
Grundøkið er 916 m² við ástandandi bygningi, 155m², í einari hædd.

**Áhugaði kunnu venda sær til:**
Inga Olsen, deildarleiðara, Miðvágur, tlf. 332550 ella
Inga Vestergaard, fyrisitingarleiðara, Tórshavn
tlf. 311350 lok. 2272

FØROYA BANKI


# Tónleikacafé skal seta ferð á menningina

**Mentanarhúsið í Fuglafirði skipar leygarkvøldið fyri tónleikacafé. Hetta verður tað fyrsta av slíkum tiltøkum, sum verða afturvendandi næstu tíðina**

TÓNLEIKUR
*Eyðun Klakstein*

Mentanarhúsið í Fuglafirði hevur hýst nógvum stórum og spennandi tónleikatiltøkum, síðani tað læt upp, men nýggi leiðarin í húsinum ætlar, at pláss eisini skal verða fyri minni og meira intimum tiltøkum í húsinum eisini.

Leygarkvøldið verður eitt tiltak, sum kanska kann koma undir hendan táttin. Tá verður nevniliga tónleikacafé í Mentanarhúsinum, og ymiskir tónleikarar fara at syngja og spæla sínar egnu sangir.

Fleiri slík tiltøk verða frameftir.

– Hetta verður gjørt, tí at hópin av dugnaligum tónleikarum sita kring alt landið og hava trupult við at fáa høvi at framføra sín tónleik fyri eini fjøld av tónleikaáhugaðum. Samstundus sakna tey mongu, ið hava stóran áhuga fyri tónleiki, júst hetta slagið av konsertum, sigur Sólarn Solmunde, leiðari fyri Mentanarhúsið.

### Seta ferð á menning

Ætlanin við nýggja átakinum hjá Mentanarhúsinum er at geva fólki møguleikan at koma saman at hugna sær við góðum tónleiki. Og tónleikurin skal vera í miðdeplinum.

– Vit meta tað vera sera umráðandi at seta ferð á menningina av føroyskum tónleikarum, soleiðis at Føroyar í framtíðini kunnu hava gagn av tónleiki sum útflutningsvinna, og fleiri tónleikarar kunnu fylgja í fótasporunum hjá eitt nú Teitur, Eivør og Týr, ið eru við til at seta Føroyar á heimskortið, sigur Sólarn Solmunde.

Fyrsta tiltakið av hesum slagi verður leygarkvøldið frá klokkan 20. Opið verður líka til kl. 04.00 sunnunáttina.


Løgtingsvalið 2004



*Tykkum, sum valdu at seta kross fyri meg, takki eg hjartaliga*

X Kári




# Starvsvenjing - ein góður møguleiki

**Sekstan ára gamli Bárður Jacobsen úr Skálafirði fór í starvsvenjing á teldufyritøkuni Formula, tí hann helt, at teldur og hann hóskaðu væl saman**

STARVSVENJING
*Malan Petersen & Kirstin Johansen*

Bárður Jacobsen úr Skálafirði er í stavsvenjing á Formula í Havn, har tey selja og ummvæla teldur. Bárður hevur áhuga fyri teldum og tí tekniska, so hann helt, at tað var upplagt at fara á eitt slíkt stað sum Formula.

Bárður sigur, at honum dámar væl á Formula, men hann hevur funnið útav, at hetta ikki er hansara framtíðararbeiði.

– Hetta er ikki heilt, sum eg helt tað fór at vera. Tað er ikki so torført, ein skal bara seta seg inn í tingini, so gongur tað, tað er eisini eitt pluss, at ein veit eitt sindur um tað, sum ein fer í holt við. Mær dámar væl, men hetta er eitt sindur óintresant.

– Eg eri eg sera glaður fyri, at eg fekk møguleikan at fara í starvsvenjing her, tí nú veit eg, hvussu tað er, og eg havi, í góðari tíð, funnið útav, at hetta er ikki tað, eg vil gera í framtíðini. Tað er sera gott, at næmingar í framhaldsdeildini fáa hendan møguleika, tí tað er nú, vit skulu finna útav, hvat vit vilja í framtíðini.

Bárður leggur aftrat, at skúlarnir skuldu hugsa meira um framtíðina hjá teimum ungu.

– Vit skulu sjálvandi eisini læra um Naploeon, Hitler og roknistykkir, men tað er ikki alt. Tíðirnar broytast, og tøkni tekur seg alt meir fram, og tíðskil mugu vit eisini fokusera uppá tað.



*Her situr Bárður við eini teldu, sum skal umvælast*

# Webber í Norðurlandahúsinum

SANGLEIKUR
*Tíðindaskriv*

Í hesum døgum ljóma tónleikastovan og samkomuhøllin í Føroya Studentaskúla og HF-skeiði aftur av tónunum frá venjandi næmingum. Síðani sangleikurin "Skeyk" var framførdur fyri nøkrum árum síðani er tað eftirhondini nærum vorðin siður, at Studentaskúlin í Hoydølum tekur stig til tílíkar stórar sangleikir. Seinast var tað "Godspell" og hesa ferð er tað leikurin "Joseph and The Amazing Technicolor Dreamcoat", tey hava sett á breddan. Tað er eingin minni enn Andrew Lloyd Webber, ið hevur skrivað tónleikin, meðan Tim Rice hevur skrivað orðini. Hetta var fyrsti leikurin hjá monnunum, ið nøkur ár seinni m.a. skrivaðu heimskendu og fagnaðu sangleikirnar "Jesus Christ Superstar" og "Evita". Hóast vit møguliga kenna hesar báðar seinast nevndu sangleikirnar betri enn "Joseph..." er hetta ikki nakar ókendur leikur. Tvørturímóti hevur hann verið spældur óteljandi ferðir síðani hann var fyrstu ferð framførdur í 1968. Tá vardi hann bert 15 minuttir, men seinni var hann longdur fyrst til 40 og síðani til 90 minuttir. Sangleikurin, sum í týðingini hjá Anna Kristin Bæk og Dániali Hoydal eitur "Jósef og ótrúliga litfagra dreymakotið" er bíbilskur og snýr seg um Jósef, sum av brøðrunum verður seldur til Egyptalands. Søgugongdin verður lýst við sangum, ið fylgja Jósefi frá trælatilveruni til hovið hjá Fárao í Egyptalandi, har hann við dreymatýðing sínari vinnur álit Fáraos og síðani fær høvið til at bjarga og at fyrigeva brøðrunum.

Felagið Tónaungdómur stendur fyri tiltakinum. At seta ein slíkan sangleik upp er eyðvitað eitt megnartak, ið krevur nógv fólk og ikki minni av fyrireiking. Umframt Tónaungdóm og Studentaskúlan í Hoydølum eru, m.a. Tórshavnar musikkskúli, Tórshavnar Kvøld & Ungdómsskúli og Norðurlandahúsið við í tiltakinum. Tað er fyri tað mesta næmingar, ið luttaka, men í summum førum er neyðugt at fáa hjálp uttanifrá, t.d. í sambandi við barnakórið, sum skal vera við. Umframt barnakórið luttaka 10 dansarar, 20 leikarar, 20 kórsangarar og 15 tónleikarar í hesi megnarverkætlanini. Jákup Veyhe hevur átikið sær at leikstjórna leikin, framleiðslustjóri er Herleif Hammer meðan Hans Olivur Joensen tekur sær av samskipan. Føroya Banki er høvuðsstuðul til tiltakið.

Ein heimasíða er í gerð www.hoydalar.fo/josef, har tú kanst fáa fatur á tíðindum og upplýsingum yvirhøvur um sangleikin. Ætlanin er eisini at hava tilfar á heimasíðuni, ið kann nýtast til undirvísingartilfar í t.d. kristni, tónleiki, enskum og føroyskum. Søgugongdin fylgir Bíbliusøguni, men málið er fírískari og lættari sum t.d. tá teir øvundsjúku brøðurnir leggja saman ráð: "Boðini í dreymunum eru týðilig og greið:/ at vit ikki kunnu kalla Jósef lítlabeiggja meir./ Um hann nú verður høgt á strá, vit duga ei at spá. / Men eitt er vist, og tað er tað, at Jósef hvørva má!/". Tónleikaliga er leikurin eisini av tí lættara slagnum við fangandi, sangbærum løgum. Tað er sermerkt fyri henda leikin, at hann inniheldur fleiri ymisk tónleikasløg. Her er alt í millum himmal og jørð frá reinum poppi til rock&roll og víðari til kalypso. "Jósef og ótrúliga litfagra dreymakotið" verður framførdur í Norðurlandahúsinum í døgunum 8. til 12 mars, so nú er tíð at gleða seg til enn eina spennandi tónleikahending í Føroyum.


TAKK



Spádómarnir vóru daprir, útlitini vánalig og ágangurin harður.
Og pengarnir til valstríð vóru ikki nógvir.
Men tit, sum taka undir við stevnu Tjóðveldisfloksins, góvu ikki upp.
Kring alt landið hava eldhugað fólk virkað fyri, at gongdin fram ímóti føroyskum fullveldi kann halda fram.
Á gøtum, á arbeiðsplássum, við hús og allastaðni har fólk hittast, hava fólk borið fram sjálvstýrishugsjónina.
Úrslitið var, at føroyingar 20. januar, beint ímóti øllum forsøgnum, gjørdu Tjóðveldisflokkin til størsta flokk á løgtingi.

Tað var eitt bragd!
Og heiðurin eiga øll tey, sum á ymsan hátt farnu vikurnar hava talað floksins søk.

At vinna eitt val er ikki ein gáva frá veljarunum, men ein uppgáva.
Og tað er ein stór uppgáva tit, sum hava valt flokkin, hava lagt á okkum, sum eru vald.
Samstundis sum vit veita okkara hjartans tøkk til øll tey, sum hava valt flokkin, lova vit at gera okkara besta til, at uppgávan verður loyst.

**Hjartans tøkk øll somul.**

E
TJÓÐVELDISFLOKKURIN
VEL FRAMTÍÐINA!

SISERO 351800